# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Serbia-Føroyar 47-24 (25-11):

# Góvu einki frá sær

**Hóast tað skjótt stóð greitt, at Serbia skuldi vinna trygt, so góvu teir einki frá sær til føroyska liðið, sum allan dystin var í veldugari mótbrekku**



*Sveinur Justinussen hevur verið plágaður av skaðum seinastu longu tíðina. Men hann er í ferð við at finna rætta formin aftur, og tað var ein av glottunum í avsmurninginum, sum Føroyar fingu í Serbia*

*Mynd: Aleksandar Djorevic*

**HONDBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ikki minni enn 23 mál vóru á muni, tá føroyska manslandsliðið í hondbólti í gjár spældi fyrsta dystin í HM-undankappingini.

Móti nummar 20 á heimsstyrkislistanum skuldi talan nú heldur ikki verið um nakra lætta uppgávu. Og hon gjørdist á ongan hátt lættari, tá farið varð inn á vøllin.

- Vit vórðu snøgt sagt blástir umkoll. Eg haldi tað stóð 7-0 á talvuni eftir nakrar fáar minuttir, so tað var næstan óhugnaligt, segði Dia Midjord, landsliðsvenjari, tá vit í gjárkvøldið fingu orðið á hann.

- Sjálvandi hava teir eitt sterkt lið. Teir vóru øgiliga væl fyri kropsliga, og samstundis megnaðu teir at spæla við nógvari ferð, so í so máta kanst tú siga, at munurin á 23 mál var tann, sum hann átti at verða. Men heilt nøgdur eri eg ikki. Hóast vit høvdu fyrireikað okkum, so vóru vit als ikki til reiðar fyrstu løtuna av dystinum.

Fingu tit so ístaðin loyvi at spæla við eftir steðgin?

- Nei, tað haldi eg ikki. Teir vita jú av, at møguliga verður bólkurin avgjørdur við málmuni, og tí vildu teir vinna við so nógvum málum sum gjørligt. Men vit spældu okkum nakað upp í seinna hálvleiki. Okkara menn tordu betri, og málverjarnir byrjaðu eisini at taka nøkur av skotunum.

- Veruleikin er eisini, at vit kendu als einki til hetta liðið, áðrenn vit byrjaðu dystin. Tann partin eru vit so nakað betri fyrireikaðir til, nú vit eiga heimadyst. Og tí eri eg slettis ikki í iva um, at vit kunnu fáa eitt betri úrslit leygardagin, segði Dia.

**Glottar**

Av føroysku spælarunum gjørdi Dánjal Tórgarð mest um seg, og venjarin var eisini skjótur at rósa vongspælarunum eftir dystin. Eisini gav Sveinur Justinussen fleiri dømi um, at hann finna aftur er í ferð við at finna stórformin, so hóast nógvir skaðar tóku av merginum hjá føroyska liðnum, so vóru eisini glottar at hóma.

Føroyska liðið ferðast heimaftur stóran part av degnum í dag. Um middagsleitið verður flogið úr Beograd, og umvegis München og Keypmannahavn lendir liðið í Føroyum í kvøld.

**FAKTA**

Serbia-Føroyar 27-24 (25-11)
**Føroyskir málskjúttar:** Dánjal Tórgarð 6, Sveinur Justinussen 4, Karl Herup Olsen 3, Roar Dalsgarð 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Dann Thorlefsson 2, Janus Sørensen 2, Tróndur Kragesteen 1
**Útvísingar:** Serbi a2, Føroyar 3

# Allardyce er trýstur

**Eftir 2-0 tapið hjá Newcastle móti Manchester City er trýstið á Newcastle-venjaran øgiligt**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@soisialurin.fo*

Sam Allardyce er enn venjari hjá Newcastle. Men hann er í løtuni stórfavorittur til at gerast næsti venjarin í Premier League, sum fær sekkin.

Í gjárkvøldið tapti Newcastle 2-0 móti Manchester City, og hetta var triða tapið á rað hjá felagnum. Allardyce varð annars av mongum mettur sum ein av heilt stóru venjarunum í Onglandi, eftir at hann miðvíst hevði bygt Bolton upp frá eini støðu sum elevatorlið til eina støðu beint undir enska toppinum. Og við teimum midlum, sum Newcastle hóast alt hevur, varð roknað við, at venjarin kundi gera eitt enn betri arbeiði her.

- Sjálvandi eri eg sum venjari í vanda eftir trý tap á rað. Vit skuldu ongan tíð havt tapt hendan dystin, og eisini skuldu vit fingið stig móti Chelsea herfyri. Men úrtøkan fyri teir tríggjar seinastu dystirnar er null, og tað økir sjálvandi um trýstið frá umheiminum, sigur Allardyce.

Komaandi mánaðin noyðist Newcastle hartil at vera Abdoulaye Faye, Habb Beye, Geremi og Obafemi Martins fyriuttan, tí hesir taka lut í Africans Nations. Men Mike Ashley, sum eigur felagið, hevur sagt, at Allardyce fær nakað av pengi at styrkja sær um hópin við.

## Mjølnir-kapping um vikuskiftið

Vikuskiftið 5.-6. januar skipar Mjølnir fyri árligu Mjølnirkappingini fyri eldri deildir. Kappingin fer fram í KÍ-høllini, fimleikarhallunum og í Badmintonhøllini. Umleið 40 lið eru tilmeldað, og vinnararnir av 1. og 2. deild verða funnir leygardagin. Sunnudagin verða finalurnar í meistaradeildini monnum og kvinnum spældar í Badmintonhøllini. Kvinnurnar spæla kl. 14.00 og menninir kl. 16.00. Vinnararnir av finalunum kunnu fáa atgongd til steypafinalurnar í februar. Hetta veldst eisini um, um sama liðið, sum vann Fleyr-kappingina fyrr í kappingarárinum eisini vinnur Mjølnirkappingina. Hinir finalistarnir eru ÍF hjá kvinnum og SÍ hjá monnum. Hetta tí at hesi feløg lógu á odda í landskappingini, tá fyrra helvtin var spæld.

**-mørk**

## Enn ein nýggjur til Fremad

Fremad Amager kundi í gjár boða frá, at felagið hjevur gjørt avtalu við 22 ára gamla Thomas Høegh, sum annars hevur spælt í B93.

Høegh spælir vanliga á miðvøllinum, men hann kann eisini nýtast á øðrum plássum.

- Vit halda, at hann hevur stórar møguleikar. B93 hevur gjørt eitt sera gott arbeiði við at menna spælaran, og tað er okkara vón, at hann mennist enn meira hjá okkum, sigur Michael Madsen, sum er ítróttarstjóri hjá Fremad Amager.

**-mørk**